Stigini eru gó›



Um eitt li› skal fylgja vi› í oddastrínum er sjálvandi ney›ugt, at stig ver›a fingin til høldar, og hetta ásanna›i Alexandur Johansen eisini, tá vit eftir dystin spurdu hann um t‡dningin av sigrinum sunnudagin.

– T‡dningin av sigrinum. Ta› veit eg ikki rættiliga. Vit fingu sjálvandi tvey stig, og ta› ræ›ur jú um at hava nógv stig, tá kappingin er li›ug.

– Annars var ta› sjálvandi t‡dningarmiki› hjá okkum at vinna, eftir at vit taptu seinasta vikuskifti›, men hóast hetta, so eri eg ikki nøgdur um spæli› hjá okkum.

– Fyri ásko›ararnar var hetta kanska ikki ein av teimum bestu dystunum. Partvíst tí ta› altí› er ke›iligt vi› mansverjing, men hetta var so ney›ugt hjá okkum hesu fer›, seg›i lítli leikarin vi› stóru hondbóltsevnunum.

Um vónirnar framyvir helt hann, at tær mundu vera hampuliga gó›ar.

– Nú mugu vit bara vóna, at venjarin skjótt aftur ver›ur tøkur. Eg haldi, at hann ætlar at royna at spæla mikudagin, tá vit hava dyst móti KÍF, men eg eri tó ivasamur, um hann er klárur til ta tí›.

– Í a›rar mátar ræ›ur bara um hjá okkum at fáa so nógv stig sum gjørligt, og so mugu vit síggja, hvussu langt ta› røkkur, seg›i altso Alexandur Johansen at enda.



Neistin-StÍF 20-27 (8-10)

StÍF eltir vestmenningar

Fyri fyrstu fer› í ár tapti besta mansli›i› hjá Neistanum landskappingardyst, men avriki› móti StÍF bendir á, at talan ikki ver›ur um ta› seinasta

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Fram til sunnudagin hev›i ári 2000 veri› ein sonn sigursgongd hjá Neistanum. Í landskappingini hev›i li›i› vunni› allar dystirnar frá ársbyrjan fram til sunnudagin, og seinasti stigamissurin var 12. desember í '99, tá teir vóru á vitjan hjá StÍF. Seinasta tapi var 21. november í fjør, tá teir taptu í Vestmanna.

Fór ikki at halda

Ikki tí, ta› hevur líka sum ligi› í luftini í heyst, at neistali›i› ikki fór ósigra› ígjøgnum hetta kappingarári›. Styrkin er neyvan at sammeta vi› hana í fjør, og hetta mundu strandingar eisini vera grei›ir um, tá teir sunnudagin fóru á vøllin.

Bæ›i li›ini máttu annars vera t‡dningarmiklar leikarar fyri uttan. Leikandi venjarin hjá StÍF var› skaddur móti VÍF fyri viku sí›ani, og hjá Neistanum sá Kári Mortensen reytt í grannauppger›ini móti Kyndli. Harumframt var Elmar Ósá heldur ikki tøkur hjá Neistanum.

Ta› var Jacob Jónsson hinvegin, og fyrsut løtuna nærum hótti hann vi› at gera av vi› strandingar einsamallur. Skot og fríspælingar streyma›u frá hondum hansara, og ta› skjótt greitt, at einasta gongda lei› hjá StÍF var at mansverja, og seinastu 50 minuttirnar av dystinum var› hetta eisini gjørt.

Johan sló›a›i fyri

Neistin, sum fram til tá hev›i veir› omaná, fekk eftir hetta ongantí› verulig gongd á spæli›.

Áki Mørk royndi seg vi› nøkrum knallhør›um skotum, men ofta var fer›in størri enn neyvleikin. Jákup Sverri fekk fatur á nógvum inni á strikuni, og gjørdist hann eisini toppskjútti, men ta› var so at siga ta›, sum Neistin hev›i at bjó›a í álopspartinum.

Tó so. Høvdu strandingar havt onkran annan málverja enn Johan Danielsen, kundi væl veri›, at máltali› hjá Neistanum var størri, »Johan Superman«, sum strandingar rópa hann, nærum læsti málinum í løtum, og leg›i har vi› lunnar undir útisigurin.

Leivur skeyt Lars ni›ur

Í álopspartinum lá sum vanligt nógv á her›unum hjá Ártur og Alexandur, men ta› var tó frá einum ø›rum armi enn teirra, at flestu StÍF málini komu.

Leivur Justinussen hevur fleiri fer›ir á›ur víst, at hann er førur fyri at senda nakrar kanónkúlur avsta›, men sjáldan hevur ta› veri› gjørt so stø›ugt, sum á Hálsi sunnudagin.

Lars Winther í Neistamálinum var› snøgt sagt skotin ni›ur á jør›ina eftir frálíka avriki› móti Kyndli, og serliga í seinna hálvleiki var sjónligt, at hann hev›i tapt sálarliga kríggi› móti StÍF álopinum, og fer› eftir fer› var› hann fanga›ur á skeiva beininum, me›an avíkavist Artur, Alexsandur og Leivur sendi bóltarnar upp í málhorni›.

Í roynd og veru var sigurin hjá StÍF ongantí› í Vanda, eftir at teir høvdu tiki› Jacob Jónsson úr spælinum.

Vanliga kvika hondbóltsspæl teirra kom kanska ongantí› veruliga til sín rætt, men hinvegin prógva›u teir vi› sigrinum, at ta› fram um hini li›ini eru teir, sum skulu takast vi› vestmenningar í oddastrí›num, men til ta› krevast, at venjarin skjótt ver›ur tøkur aftur.

Dysturin í tølum
Malskjúttar:
Neistin: Jákup Sverri Kass 8(1), Áki Mørk 5, Jacob Jónsson 4, Regin Didriksen 2, Ári Rouch 1
StÍF: Leivur Justinussen 9, Alexandur Johansen 6(1), Marius Joensen 4, Andre F, Danielsen 3, Artur Johansen 3, Pauli Poulsen 1
Brotskøst: Neistin 2, StÍF 3
Útvísingar: Neistin 6
Diskvalifikatión:
Neistin 1(3x2 minuttir)

StÍF vann t‡dnignarmiklu uppger›ina móti Neistanum, og tykjast í løtuni vera einasta li›i›, sum kann hótta vestmenningar

Mynd: Álvur Haraldsen

Javnleikur í Vestmanna

Ta› var um reppi›, at kyndilsmenn máttu taka til takkar vi› tri›ja tapinum á ra›, men í evstu løtu bjarga›u teir ø›rum stiginum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Kyndil-KÍF 23-23 (13-10)

Byrjanin hjá besta mansli›num hjá Kyndli hevur ikki veri› naka› at reypa av hetta kappingarári›.

Tvey stig úr trimum teimum fyrstu dystunum er ikki naka›, sum sigursvandu havnarmenninir eru vanir vi›, og ætlanin var uttan iva at betra um úrtøkuna, tá teir leygardagin fóru til Vestmanna.

Skerdir

Kyndilsli›i› var tó naka› skert undan dystinum, tí bæ›i Regin Petersen og Hans Áki Dal-Christiansen fingu reytt kort móti Neistanum, og máttu tískil sita uttanfyri hendan dystin. Hans Áki fekk annars leikbann í tveir dystir, so hann ver›ur heldur ikki tøkur til komandi dyst.

Einki er at taka seg aftur í, at hetta nerva›i kyndilsli›i›, og serliga tóktist hetta at koma illa vi› í verjupartinum.

Hesin rigga›i nevnliga sera illa í stórum pørtum av dystinum, og hetta dugdu kollfir›ingar eisini at gera sær dælt av. Serliga var ta› leikandi venjarin, sum fekk nyttu burtur úr leysu markeringunum, og var ta› ikki fyri ein væl leikandi Jens Skipagøta í málinum, so hev›i lei›slan hjá kollfir›ingum ivaleyst veri› tvísiffra› í hálvleikinum.

Nú var hon ikki meira enn tr‡ mál, og hetta eiga kyndilsmenn at vera fegnir um. Ikki tí, Óla Christian stó› eisini væl í KÍF málinum, har ta› serliga vóru vengurnir, sum misnt‡ttu opnar møguleikar, men til hetta hoyrir eisini, at skotini frá teimum ikki sótu serliga væl.

At ta› lá somiki› illa fyri hjá Kyndli í sí›unum, vi›førdi eisini, at KÍF í stóran mun bert hugsa›i um at verja fyri mi›- og bakspælarunum hjá Kyndli, og hetta eydna›ist eisini sera væl. Bjarni Wardum fekk als ikki ta› burturúr, sum hann er vanur vi›, og Jónleif Sólsker hev›i bart sagt ein vánaligan dag.

Her er Rúnin sloppin leysur av verjuni, men yvirhøvur høvdu kollfir›ingar væl fatur í kyndilsmonnum
Mynd: Álvur Haraldsen

Sophus vendi dystinum

Sum nevnt, so var KÍF á odda vi› trimum málum í steg›inum, og beinan vegin eftir steg›in fóru teir eisini undir at útbyggja hesa.

At ta› at enda eydna›ist Kyndli at bjarga ø›rum stiginum, var serliga einum leikara at takka. Kyndils venjarin, Sophus Dal-Cristiansen, hevur ikki spælt sjálvur seinnu árini, men hesu fer› sá hann sær ongan annan útveg enn sjálvur at fara á vøllin.

Í síni tí› mundi hann vera ein av bestu vongspælarunum í landinum, og hann prógva›i eisini leygardagin, at hesi evni enn ikki eru gloymd.

Vongspæli› hjá Kyndli gjørdist beinan vegin meira ágangandi, eftir at hann kom inn, ogh umframt einsamalla máli›, sum hann fekk á dómarase›linum, var hann eisini upphavi› til eini tr‡ av teimum átta brotskøstunum, sum Kyndil fekk í seinna hálvleiki.

Serliga eitt av hesum fekk ø›i í kollfir›ingar, og spurningurin er, um ikki hetta kosta›i teimum sigurin. Stø›an var tá 22-20 til KÍF, og Kyndil hev›i júst fingi› ein mann útvístan. Í álopsroynd síni fingu teir tó tilluta› brotskast, men hetta vóru teir á heimali›num als ikki nøgdur um. Endin var, at tveir av teimum hjá heimali›num fingu tveir minuttir á beinkinum, og so kundi Kyndil toga› seg upp á javnt.

Kollfir›ingar fingu tó enn einafer› lagt seg á odda, men í seinastu álopsroynd síni fekk Kyndil aftur tilluta› brotskast. Bjarni Wardum mundi vera kaldasti ma›ur í Vestmanna, tá hann skrúva›i bóltin út um málverjan, á›renn hann stikla›i inn í máli› til endaliga javnleikin.

Nógv vantar í

Sum nevnt í byrjanini, so hevur Kyndil langt í frá fingi› nakra ynskisbyrjan, og ta› skal eisini nógv broytast, um teir í ár skulu gerast gullkandidatar.

Komandi vikuskifti skulu teir inn á Skála at royna seg, og uttan Hans Áka, sum framvegis er leikbanna›ur, ver›ur hetta ivaleyst ein sera møtumikil uppgáva.

Størsti trupulleikin hjá li›num tykist í løtuni at vera, at teir í alt ov lítlan mun megna at spæla seg igjøgnum í álopspartinum.

Alt ov stórur partur av ábyrgdini fyri málskjóting hongu á her›unum hjá Bjarna, men møguliga ver›ur hetta broytt, tá Regin Petersen aftur er tøkur. Leygardagin hekk verjuparturin heldur ikki nóg væl saman. Møguliga tí teir ikki kundu n‡ta Hans Áka sum bylgjubrótara.

Fara at loypa hvøkk á

Avriki hjá KÍF skal tó als ikki forsmáast, tí teir vístu so sanniliga eisini tenn leygardagin.

Eftir dystin vóru ta› eisini teir, sum høvdu nógv størstu orsøkina at í›ra seg, tí so at siga allan dystin høvdu teir tamarhald á stø›uni.

Leikandi venjarin tykist vera bæ›i ein gó›ur skjútti og ein frálíkur hondbóltsleikari, sum gevur teimum nógv fleiri streingir í álopspartinum. At Eddie er kommin í aftur vi›førir eisini, at hóttanin móti mótstø›umálinum gerst nógv størri, og ivaleyst fæst enn meira nytta burtur úr honum, tá Finn Heri aftur ver›ur tøkur á strikuni. Alt hetta ger eisini, at minni ábyrgd liggur á her›unum hjá tvær fer›ir Petur Martini og so Jákupi Dam, og hartil ver›ur li›i› heldur ikki eins nær tengt at avrikunum hjá Óla Krstiani í málinum.

Einasti vansin tykist vera, at enn er orkan ikki nóg gó› til at koyra vi› fullari fer› í samfullar 60 minuttir, men hetta kemur ivaleyst, so hvørt sum ári› lí›ur, ta› eigur ikki at loypa hvøkk á nakran, um KÍf fer at gera fortre› vi› fleiri av teimum li›unum, sum framman undan vór›u rokna›i fyri favorittar.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
KÍF: Tomic Durica 9(5), Eddie Joensen 4, Petur Martin oulsen 4, Petur Martin Johansen 2, Vagnur Johannesen 2, Jákup Dam 1, Kristian Madsen
Kyndil: Bjarni Wardum 10(7), Uni Wardum 5, Jónleif Sólsker 4(2), Rúni Poulsen 3, Sophus Dal-Christiansen 1
Brotskøst: KÍF 6, Kyndil 10
Útvísingar: KÍF 4, Kyndil 2
Dómarar úr H71: Petur Skeel Dahl og Kristian Martin Skála



Av ney›

Sophus Dal-Christiansen gjørdist leygaragin leikandi venjarin hjá Kyndli, men hett er so avgjørt ikki naka›, sum Sophus sjálvur ætlar sum eina varandi loysn.

- Ta› var ein alstórur trupulleiki hjá okkum, at vongspælararnir ikki skora›u upp á teir møguleikar, sum vit høvdu. Tí var ta› kalla ein ney›loysn, at eg fór inn á vøllin, og so er bara at vóna, at ta› ikki ver›ur tørvur á hesum aftur, seg›i venjarin eftir dystin.

Undan uppger›ini var› rokna› vi›, at ein sigur mundi vera kravi› til Kyndil, men kortini helt Sophus, at teir kunnu ikki anna› enn vera nøgdir um javnleikin.

- Vit koma alt ov langt aftur um á máltalvuni, og tí skulu vit vera fegnir um javnleikin, helt hann eftir dystin, og ta› kann eisini vísa seg, at hetta ver›ur kostna›arleyst hjá Kyndli.

Ver›ur talan ikki um a›rar javnleikir í grunduspælinum, so geur dystrin hóast alt fulla úrtøku í stigum, og so er í øllum førum einki tapt hjá Kyndli.

jm

Av sí›ulinjuni

Regin Petersen mátti eyglei›a dystin leygardagin av ásko›arapláss-unum. Hetta tí hann fekk reytt kort móti Neistanum fyri viku sí›ani.

Sostatt var lítí›, sum hann kundi gera, til tess at hjálpa li›felögunum, sum í ólukkumát tørva›u onkran skjútta aftarat Bjarna Wardum. Komandi sunnudag er Regin tó vi› aftur, og so mugu teir hjá Kyndli bert vóna, at hetta fer at gera mun.

jm